## Tøkk

Øll tit sum vístu samkenslu tá elskaði maður, pápi, verpápi, sonur og beiggi

**Jens Pauli Poulsen**
Tvøroyri

so brádliga varð tikin frá okkum og fór til jarðar, takka vit hjartaliga.
Takk til Jónsvein Bech prest fyri troytarrík orð.
Takk til berarar, sangarar og kirkjutænara.
Takk fyri tað stóru hjálp vit fingu til ervið.
Takk fyri blómur, kransar, telefonsamrøður og peningagávur og takk til tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Súsanna, Sólvá og Poul Arni**

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá okkara góða mamma, vermamma, omma, langomma og systir

**Sigrid Matras**

andaðist og fór til gravar.

*Familjunnar vegna*
**Jovina, Mildrid, Berghild og Miriam**

†

Okkara kæri sonur og beiggi

**Gunnar Berg**

andaðist týsdagin 4. november 2003, 31 ára gamal.

Bønarhald á Ríkissjúkrahúsinum og jarðarferðin úr Vesturkirkjuni verður lýst í útvarpinum.

**Anna, Eilif og Jákup**

†

Góði maður mín, pápi, abbi og langabbi okkara

**John Thomsen**
**Klaksvík,**
ættaður úr Porkeri

andaðist 5. november, 92 ára gamal.

Farið verður úr heiminum í Betesda sunnudagin 9. november kl. 16.00.
Jarðarferðin verður mánadagin 10. november kl. 13.30.

**Jonhild, Tove, Kára og Anna**

# Tombola í Hósvík

TÍÐINDASKRIV

Nýggjársnevndin í Hósvík skipar í dag kl. 15.00 fyri tombola, meksikanskar uppboðsølu og kaffisølu í bygdarhúsinum í Hósvík.

Fyri at savna inn pening til keyp av fýrverki, skipar nýggjarsnevndin í ár fyri tombola, meksikanskari uppboðssølu og kaffisølu.

Eisini hevur handilin "Friendtex" útsølu av klædnavørum í bygdarhúsinum.

Nýggjársnevndin í Hósvík hevur í nøkur ár skipað fyri einum sera vøkrum fýrverki í Hósvík á nýggjárinum og er tað eisini ætlanin ár. Bílagt er sum vanligt fýrverk av tí slagnum sum sæst í Tivoli í Keypmannahavn og hevur tað undanfarin ár verið til stóra gleði fyri bygdarfólkið.

Tað sigst at fýrverkið sæst líka norður til Oyrar og man tað eisini hava verið til stóra gleði fyri íbúgvararnar á Selatrað.

Til Keypmannahavn ....... Prísir úr Dkr. 1.695,-
Til Billund .................... Prísir úr Dkr. 1.733,-
Minst til títt Maersk Air Bonuskort

Vitja eisini okkara nýggja handil á www.maersk-air.fo
Maersk Air · Handilskjarnin · FO-100 Tórshavn · Tel.: 35 74 74 · Fax: 35 74 75
Prísirnir eru uttan avgreiðslugjald á Dkr. 220,-
MAERSK AIR
It's got to be perfect






